TING-HELLAN

# For så vidt angår Færøerne

**Á Tinghelluni á hesum sinni viðger Kári á Rógvi tær báðar lógirnar um uttanríkis-heimildar - eina fyri Grønland og eina fyri Føroyar - ið ríkispartarnir í hesum døgum tingast um**

TINGHELLUANALYSAN
*Kári á Rógvi*
*kari_law@post.olivant.fo*



Tá Danmarks Riges Grundlov seinast var endurskoða í 1953, var tað "formoda," at heimastýrisskipanin var í samsvari við grundlógina. Longu í 1948 samdust Føroyar og Danmark um eina skipan við heimastýri, ið millum annað viðurkendi, at føroyskir myndugleikar høvdu "lóggávuvald og umboðsvald."

At viðurkenna heimildir Føroya at løggeva og fyrisita bar til, hóast grundlógin í 1948 segði, at lóggávuvaldið var hjá "Kongen og Rigsdagen" í felag, og hóast "Kongen" og "Regeringen" sambært grundlógini skuldu standa fyri útinnandi valdinum og umboðan úteftir.

Tað bar eisini til hjá føroyskum myndugleikum at samtykkja fíggjarlóg og aðrar játtanarlógir, hóast grundlógin segði, at ríkistingið skuldi samtykkja "Finanslov" sum fortreyt fyri øllum almennum útreiðslum.

Alt hetta, sum saktans kundi tykst "uppá kant við" grundlógina, var nú "formoda" at vera í lagi. Eisini var samtykt longu í fyrstu paragraff at áseta, at Danmarkar ríki gongur í bólkum; har kom at standa, at grundlógin er galdandi fyri "alle dele af Danmarks Rige."

Tann endurskoðaða grundlógin var kunngjørd í 1953, og umframt "formodningina" um, at føroyskir myndugleikar kundu fáa heimildir, ið annars kundu tykjast ólærdum at liggja hjá ríkisstovnum, var eisini ein heimild til at lata vald til "mellemfolkelige myndigheder." Hetta stendur í § 20 og hugsað var fyrst og fremst um greitt at heimila limaskapi í tí, vit nú nevna Europeiska Samveldið, ES.

Tað stendur tó onki í § 20 um, at ymsu "dele af Danmarks rige" hvør sær kunnu lata vald frá sær ella lata vera; heldur onki er nevnt um at taka seg úr aftur ES ella øðrum "millumfólkaligum" samveldum. Men tó sluppu Føroyar undan at fara uppí ES; og Grønland kundi seinni enntá taka seg úr samveldisstøðuni við ES.

## Tað ber so grúiliga væl til

Danir er skemtingarsamir. Millum danskt skemt er hugfarsliga søgan um humlufluguna. Henda fluga er heldur trivaliga á at líta, hyldlig og loðin við veingjum so smáum, at tú undrast á, at tær megna at bera fluguni uppi. "Humleflugan fær ikki flogið," siga danir, men - leggja teir skemtandi afturat - "hon veit bara ikki av tí."

Nakað soleiðis hugsa afturlítandi embætismenn í donskum ráðum helst um okkum. Føroyskir myndugleikar kunnu hvørki eitt ella annað, teir vita bara ikki av tí. Meðan føroyskir myndugleikar surra sum humluflugan, so ugga stívrendir embætismenn seg við, at hetta í veruleikanum stríður ímóti øllum viti og skili, og ein vakran dag, man føroyska flugan fella til jarðar.

Við uppskotinum um fólkatingslóg um uttanríkisheimildir Grønlands og teirri enn ikki føddu tvíburðasystrini um uttanríkisheimildir Føroya, er hesin dagur at enda upprunnin. Nú skal samtykkjast, at føroyskir myndugleikar í veruleikum onki sjálvstøðugt vald kunnu hava, tí tað "er ikki lov" sambært grundlógini. Føroyskt vald skal "formodast" burtur aftur.

Danskir politikarar tykjast ikki hava nakran trupulleika at viðurkenna føroyskar heimildir og føroyskt vald. Beint eftir annan heimsbardaga, tá danir vildu samráðast við Føroyingar um nýggja skipan av samveldinum okkara millum, segði danski tingmaðurin Robert Størmose á fólkatingi, at neyðugt var at samráðast bæði við grønlendarar og føroyingar, so ikki somu mistøk vórðu gjørd sum mótvegis íslendingum. Serliga var neyðugt beinanvegin at viðurkenna uttan nakað fyrivarni, at føroyingar eru "en Nation" - tjóð - við øllum tí, hetta ber í sær.

Formælið til heimastýrislógina nevnir eisini "den Særstilling, som Færøerne indtager i national Henseende."

Eisini verandi forsætisráðhari hevur ikki bert sagt, at Føroyar og Grønland skulu fáa fleiri veruligar heimildir uttanríkispolitiskt, hann hevur enntá sagt av fólkatingsins røðarapalli, at Tórbjørn Jacobsen (ið tá sat á danatingi) var vælkomin at halda og meina, at føroyska fólkið og løgtingið vóru omanfyri grundlógina. Tí slíkt vóru teoretiskir spurningar, segði Fogh.

Til ber sostatt hjá Anders Fogh at fara so langt, at hann semist við Tobba, tann mest víðgongda loysingarmannin og tað minst semjusøkjandi av øllum tingfólkum í Føroyum, um at teir báðir kunnu hava hvør sína fatan av støðuni. So mátti tað borið til hjá honum at samst við Jóannes og Lisbeth um eina hampiliga nýskipan av viðurskiftunum, uttan at heimstýrisskipanin skal endavendast.

Hetta tykist enn meiri eyðvitað, tí fólkatingið í 1999 samtykti svart uppá hvítt, at føroyska fólkið skuldi gera av, hvussu framtíðar sambandið ríkispartanna millum skuldi skipast.

Tað átti at borið so grúiliga væl til.



## Blakman konge vågner om nat

Í ættini hjá konu míni eru tey von at kvøða vísuna um Blakman konge. Hon er um sanndroymdan kong, ið droymir, fyrst at hann stríðist ímóti trimum bjarnum og vinnur tær, síðani at hann berjist ímóti eini leyvu, men tapir ímóti henni. Hann fer í víggj og møtir Vidrik Verlandsøn, ið stríðist undir bannara við eini leyvu á. Hóast Blakman kennir á sær, at hann fer at tapa, vil hann heldur doyggja menskan deyða, enn geva seg yvir. Í vísuni verður tikið til:

"Meldte det Vidrik
Verlandsøn, han blev i
kinderne rød;
det var stor ynk at se derpå, at
slig en kæmpe skulle dø."

Tað tykir mær, sum nakrir fámentir embætismenn stríða sama stríðið ímóti lagnuni. Er onkur færøekspertur sanndroymdur, man hann hava droymt nakað tað sama um eina hvítabjørn og ein veðr.

Áðurnevndi Størmose minti á sinni á, hvussu óhepnir danir høvdu verið við embætisfólki sínum í Føroyum, hagar teir mangan høvdu beitt fólk, ið ikki kundi brúkast aðrastaðni. Slík fólk tykjast enn sita sum luft í rørunum í uttanríkis- og forsætismálaráðunum. Men illa ber til annað enn at virða dyrvi og ágrýtni teirra at rógva andróður móti tíðini.

## Eitt til viks og fleiri eftir reyv

Hvat er so galið við heimildarlógini? Jú, fyrst staðfestur hon, at føroyskir myndugleikar kunnu gera avtalur við onnur lond. Hetta er staðfesting av siðvenjuni og er tí í besta føri eitt fet til viks. Síðani ásetir hon, at danskir myndugleikar kunnu gera avtalur og sáttmálar á okkara málsøkjum, og enntá siga upp teir sáttmálar og tær avtalur, ið vit hava gjørt. Síðani stendur, at vit skulu boða frá áðrenn, meðan og aftaná vit samráðast við onnur lond, líkamikið hvat tað snýr seg um, og uttan mun til, um hetta eru avtalur, ið vit mangan fyrr hava gjørt. Eisini er stappað uppí sekkir av viðmerkingum, sum